Sandblásing av akførum

Hjá Sp/f Sandblásing við Ljósá eru teir nýliga farnir í holt við at sandblása øll sløg av akførum. Sandblásing er munadyggasta reinsingin av rusti, siga brøðurnir Heðin og Pauli Poulsen, sum eiga og reka fyritøkuna

SANDBLÁSING

Nú verður møguligt hjá bilverkstøðum eins væl og privatum at fáa sandblást rust av bilum. Endamálið hjá Sp/f Sandblásing er ikki at kappast við bilverkstøðini, men at samstarva við tey um rustviðgerð av bilum.

Um eitt akfar er heilt avmonterað, kann stell og skrokkur sandblásast alt sum tað er og eftirfylgjandi metalliserast og lakkerast.

Er bilurin byrjaður at rusta uttan, tað vil siga tak, hjálmar, gáttir, botnur, hurðar o. s. fr. kann tað plettblásast, tað vil siga at einans økini, har rustur er, verða sandblást. Hetta verður gjørt við hvøssum sandkornum, smáum dysum og lágum trýsti. Eftir sandblásingina verða økini reinsað fyri støv, og zink verður smurt á fyri at nýrustur ikki skal leggjast á aftur. Akfarið verður nú gjørt klárt til at koyrast á eitt bilverkstað til lakkering.

Sum áður nevnt er sandblásing munadyggasta reinsingin av rusti. Samstundis er tað ymsastaðni á bilum ógvuliga torført um ikki ómøguligt at reinsa eitt øki fyri rust við at pussa tað. Tað klárar sandblásing.

Sandblásing av akførum er ein skjót, góð og bílig loysn.

NÚ
SANDBLÁSA
VIT EISINI
BILAR

Sp/f Sandblásing hevur útgerðina.

SANDBLÁSING

FO-466 Ljósá · Tel 423111 · Fax 423432
sandblasing@post.olivant.fo · www.sandblasing.fo

KREA.FO · TEL 44 93 39

Trygt frá og til
- ring til BIL

(311 444

- Vit gera ørindir fyri fólk
- Kioskvørur fáast til keyps
- Vit selja til dømis:
  - Talutíðarkort frá Kall og Føroya Tele
  - Kort til korttelefon
  - Vikubløð

Vit svara alt samdøgrið

BIL 31 14 44 Mini-taxi

Sosialurin 341800

BILLAKK
Í
SPRAYDUNKUM

VIT KOYRA BILLAKK Í SPRAYDUNKAR

SP/F SKÁLAFJARÐAR MÁLINGAHANDIL
Boks 69 · FO-600 Saltangará · Faroe Islands
Tel (298) 44 77 77 · Fax (298) 44 85 55
E-mail: skamal@post.olivant.fo

Sosialurin 341800